# pplivir barnadreymin




– Og sum her er fínt, men nei, soleiðis høvdu vit ikki avtalað, og eru tey ungu glað fyri tað, so eri eg eisini, mutlar hon.

### Aftur á slóðina

Daniella hevur privatsjaffør í dag og tað ger hon gagn av. Hon dirigerar og eg koyri. Vit skulu niðan í Horn, har Daniella er uppvaksin. Hon eigur eini hús har, sum hon keypti á eini uppboðssølu í fimmtiárunum. Húsini liggja avsíðis og vit fara til gongu niðan gjøgnum váta velta lendið.

– Her vaks eg upp. Hon peikar á toftirnar av garðinum í Horni. Húsini eru fyri langari tíð síðan avtoftaði og húsini hjá Daniellu, sum standa skamt frá, eru bygt tíðliga í seinastu øld. Tað var skyldmaður Daniellu, Rasmus í Horni, sum bygdi tey. Daniella hyggur seg um, nú vit eru komnir niðan til portrið. Allarhelst ger lívssøgan eitt rend gjøgnum hennara hugaheim nú og hon sær øll barnaárini fyri sær í einum splitsekundi. Hon sær álvarsom út í andlitinum meðan hon hugsar hart og eg hoyri einki annað enn kalda landsynningin og veika ýlið í hennara hoyriapparati hendan dagin í triðju vikuni í advent.

Mamma Daniellu, Katrina í Horni giftist ongantíð.

– Mamma fór niður í 1919. Hon skuldi niður á háskula, tað var beint eftir fyrra heimskríggj og hon kom ongantíð heim aftur. Eg minnist væl dagin, tá ið hon fór. Vit fylgdu henni inn á Grind, sum er nakað innanfyri Todnes og síðan fór hon til gongu og vit fóru út aftur í Horn. Hon kom aftur seks ár seinni í 1925, men tá treivst hon ikki í Føroyum.

– Hjá mær var omman alt, og hon doyði longu, tá ið eg var fimm ára gomul. Hon fekk kreft og tá ið tíðini gingu tað sjáldan meira enn tvey ár eftir at fólk gjørdust sjúk, so doyðu tey Síðani vaks eg upp saman við mostir míni í Horni. Hon var ikki so nógv ár eldri enn eg. Abbi mín hevði eisini stóran týdning fyri meg. Hann vakti mín áhuga fyri sjónleiki. Tað var eitt ríkt mentanarlív á Sandi, tá ið eg var barn, vit høvdu so góðar lærarar, prestar og læknar. Abbi doyði tá ið eg var átta ára gomul, og tað var ein smeitur, sigur Daniella, meðan vit standa inni í lága køkinum í frítíðarhúsi hennara í Horni. Her er kalt inni og nógv fólk hava húsast her undir trongum umstøðum seinastu øldina.

### Ein barnadreymur

– Eg havi altíð droymt um eitt bókasavn á Sandi og tað var Sigvald Djurhuus, lærari og ættaður úr Kollafirði, sum vakti mín áhuga fyri bókum. Hann var útbúgvin úr Danmark, og kom heim aftur til Føroya við nógvum nýggjum hugskotum. Hann var tað vit i dag kalla fyri ein modernaður lærari. Hann hevði eitt lítið bókasavn í skúlanum og vit sluppu at læna bøkur við heim. Hann var ógiftur, tá hann kom til Sands og giftist við Kristinu í Koytu. Síðan tá havi eg havt stóran áhuga fyri bókum og eg gleðist yvir, at heimbygdin nú endiliga fær eitt bókasavn, hóast tað kemur mong ár ov seint, sigur Daniella, meðan vit koyra norður móti Skopun.

Vit hava koyrt runt við jólagávum. Fyrst út á Grótteigar og síðan niðan til systkinabarnið Hjørdis, sum er deyð fyri langari tíð síðani. Har byr hennara sonur Alti og hansara familja og nú standa vit í túninum hjá Kathrinu Lognberg í Skopun, sum er nakað yngri enn Daniella. Tað eru 60 ár síðani hon giftist av Argjum til Skopunar og tær hava kenst leingi. Katrina hevði búð hjá mammu Daniellu, tá ið hon hevði verið niðri sum ung.

– Tað er vælsignað, at vit báðar sluppu at síggja hvørja aðra aftur, sigur Katrina við Daniellu og tær seta seg báðar at práta hart í køkinum, meðan nýkókaðar kleynum og søtt te fer niður um. Í gongini standa tveir novemberkaktusar og blóma við reyðum blómum og lýða á.

– Eg havi átt teir leingi. Fekk teir frá svigermammuni, fyrst eg kom til Skopunar og hon hevði havt teir leingi. Teir eru gamlir og blomstra á hvørjum ári frá oktober, sigur Katrina. Hon hevur nakað milt yvir sær og mildheitin kemur serliga týðuliga fram, tá ið Daniella gerst ivrig í prátinum og bítur frá sær.

### Lívið í oysregni

Og ferðin er við at koma at enda. Vit standa í góðari tíð niðri í bíðiróðini í bilinum meðan Teistin er onkustaðni uttanfyri. Her er stormur og oysregn og Daniella fortelur kut úr lívssøguni, meðan vátir skopuningar ganga hálvrennandi framvið.

– Eg fór til Havnar á háskúla í 1930 og var á húsholdningsskúla í 1931. Í 1932 fór eg á lærara-skúla og tók prógv í 1935, men tá vóru ringar tíðir og ómøguligt var at fáa arbeiði. Eg var arbeiðsgenta hjá Jens Paula í Dali. Í 1936 fór eg niður. Har kom eg saman aftur við mammu. Vit búði ikki saman beinanvegin. Men seinni fluttu vit í eina íbúð saman. Eg tók studentakursus og í 1939 fór eg á universitetið til hægri lesnað. Eg læs týskt sum høvuðsfak, eg læs eisini enskt og danskt. Eg arbeiddi eisini meðan eg læs. Eg fekk starv á Berlingaranum og var á redaktiónini hjá Friis, har eg tókst við ymiskt skrivstovuarbeiði. Hetta var ein sera spennandi tíð, sigur Daniella.

Daniella var niðri øll krígsárini og kom heim aftur til Føroyar í 1952. Tá var hon cand. mag í týskum og enskum Hon tekur til hvussu gott samanhaldið var millum føroyingar niðri undir krígnum.

– Mamma var í øðini, tá ið eg fór heim aftur, men heim vildi eg. Eg veit ikki um tað var rætt, eg var í hvussu er yvirkvalifiserað bókliga til lærararbeiðið í fólkaskúlanum tey fyrstu mongu árini. Her var einki annað arbeiði, sigur Daniella. Hon byrjaði sín lærara-gerning í real og mellemskolen í Klaksvík. Fór síðan til Havnar, har hon var lærari á Studenta-skúlanum, seinni á Lærara-skúlanum og í kvøldskúlanum.

Einaferð í januar verður almenn móttøka, tá ið bókasavnið hjá Daniellu alment verður tikið í nýtslu.

Daniella hevur privatsjaffør í dag og tí er lagamanni at fara í keypsamtøkuna í miðbýnum til handils, áðrenn koyrt verður aftur niðan í Gundadal, har ketturnar bíða spentar eftir mammuni og kettumati.





*Frá vinstru, Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri, Daniella og Palli Gregoriusen, arkitektur*



*Alt er sum tað skal vera í Horni. Her er Daniella á veg út og stavurin bíðar*